5 707265 100029 >

# 8 spurningar um jól

## Eyðun Nolsøe

***Hvat er tað besta við jólunum?***
Tað besta er familjuhugnin. At sita saman við sínum kæru og njóta jólafriðin.

***Hvat er tað keðiligasta við jólunum?***
Eg haldi at materialisman á jólum er sera ókjekka og lítið í trá við jólaandan.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Eg helt jól saman við mammu og babba og einari rúgvu av systrum og beiggjum. Træið bleiv pyntað lítla jólaaftan, men eg slapp ikki at síggja tað fyrr enn jólaaftan. Vit ótu góðan mat, dansaðu um jólatræið og fingu gávur. Ikki so nógvar og dýrar sum vit síggja í dag, men gleðin var minst líka stór um tað vit fingu.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Á Tvøroyri saman við familju og svigerfamilju. Har er av sonnum hugnaligt at vera á jólum. Maturin er heilt einastandandi og vit plaga at hava tað sum blomman í egginum. Eg gleði meg serliga til at vera saman við dóttrini, sum ikki er fylt 2 ár enn. Hon gevur jólunum nýtt innihald aftur fyri okkum øll somul.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Tað er ikki nakað fyri meg. Sjálvandi er tað nógv fólk sum vinna sær kærkomnan pening í jólamánaðinum og tað er teimum væl unt. Sum tónleikari eru jólini eisini ofta hásesong. Eg eri bara ikki typan sum trívist í hesum gávumeldrinum, havi hug at goyma meg burtur til tað er yvirstaðið.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja tað havi eg nakrar ferð, men ikki longur burtur enn í DK.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Ja onkrar, t.d. til damuna. Annars er hon óført at taka sær av hasi uppgávuni og takk fái hon fyri tað!

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Eg ynski mær kærleika, eina familju í blóma, góðar vinir og ein lekran feitan Audi!! Um eg fái 3/4 av ynskjunum uppfylt eri eg sera vælnøgdur:)



























